# Mønustingurin hjá sílaalingini

**– Vit hava eina ringa sak um dumping. Alarar eru mótleysir og fara neyvan at gera nakað serligt fyri at verja seg, sigur Regin Jacobsen**

DUMPINGÁKÆRUR
*Vilmund Jacobsen*



*- Fáa vit ein toll á sílum uppá 50%, verður tað mønustingurin fyri alla sílaaling í Føroyum, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, sum undrast yvir, at føroyskir myndugleikar eru so passivir í dumpingmálunum.*

20. desember boðaði ES frá, at dumpingákæran móti føroyskum laksaalarum er slept, og at sakin er niðurløgd.

Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost á Glyvrum, sigur, at ES í veruleikanum viðgjørdi sakirnar móti føroyingum, norðmonnum og chilenarum undir einum.

– ES fann onga dumping í Føroyum, men sigur, at bæði Noreg og Chili hava selt laks á ES-marknaðinum fyri dumpingprísir.

Støðan hjá ES, sigur Regin er, at handilin við laksi skal vera fullkomiliga fríur.

### Ein ring sak

Men ákærurnar móti føroyskum alarum steðgaðu ikki, hóast málið um laksin er lagt aftur um.

Nú eru tað so finnlendingar, sum ákæra føroyskar og norskar sílaalarar fyri at dumpa prísirnar á sílum á ES-marknaðinum.

Regin vísir á, at norðmenn selja nógvan laks til ES, men nøgdirnar úr Føroyum hava verið smáar í tíðarskeiðnum, ákæran snýr seg um, nevniliga frá 1. oktober 2001 til 30. september 2002.

– Vit útfluttu umleið 7.000 tons av sílum í fjør, harav meginparturin fór til Fjareystur. Sílamarknaðurin var sera vánaligur, og hóast nøgdirnar til ES bert snúgva seg um nøkur hundrað tons í umrødda tíðarskeiði, hava vit eina ringa sak.

Stjórin á Bakkafrost vísir á, at tann parturin, sum fór til ES, partvís var síl, sum ikki slapst av við eystanfyri. Alarar høvdu tískil valið ímillum at selja sílini bíliga til ES - ella at eta tey sjálvir!

– Eg vil siga, at sílamarknaðurin fullkomiliga kollapsaði fyrst í árinum, sum nú skal kannast, og sílaalarar høvdu miljónatap.

Hann sigur, at hendan sakin tískil er heilt øðvísi og verri enn laksasakin, har føroyingar høvdu góð kort á hondini.

– Alarar kenna seg drignar eftir hárinum einaferð aftrat og eru mótleysir. Ein slík sak kostar nógvan pening og nógv stríð, og eg vænti ikki, at alarar hava orku og møguleikar til at verja seg í hesum máli.

### Mønustingur

Regin undrast yvir, at landsins myndugleikar standa fullkomiliga passivir í hesum máli og siga, at hetta er eitt mál, sum vinnan noyðist at klára sjálv.

– Tað er undarligt, at okkara handilsviðurskifti við ES knappliga einki skulu hava við politikk at gera.

Eitt sindur speiskliga tekur hann til, at kanska halda okkara myndugleikar, at tað er meira spennandi at fáast við grót og betong enn laks og síl - ella kanska eru teir passivir, tí teir halda seg ikki hava skil fyri hesum.

– Fáa vit ein toll á sílum uppá 50%, verður tað mønustingurin fyri alla sílaaling í Føroyum, sigur Regin Jacobsen.

At enda vísir hann á, at Føroyar hava eina hampiliga avtalu við ES, men tá ið dumpingákærur koma, standa føroyingar veikir.

## Meira burtur úr sildini

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hevur gjørt nakað burtur úr, at fesk sild verður seld fyri 90 oyru til eina krónu fyri kilo í Føroyum, samstundis sum henda sama sildin kundi seljast fyri heilt upp til eina krónu stk. undir krígnum.

Í dag keypir Havsbrún 5-6 sildir, sum fara til eitt kilo, fyri eina krónu, men tá ið "gylta gullið" hevði besta prísin undir krígnum, kundu útróðrarmenn geva heilt upp í eina krónu fyri hvørja sild!

Sosialurin fer í blaðnum í morgin at gera eitt sindur meira burtur úr, hví hetta nú einaferð er so.

## Nóg mikið av fiski til fleiri dagar

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Í fiskavirkinum í Miðvági hava tey havt úr at gera hesa vikuna, og nóg mikið er av fiski til næstu dagarnar eisini.*

Hesa vikuna hevur verið úr at gera á virkinum hjá Fiskavirking í Miðvági.

Væl av fiski er komið uppá land, hóast stutt er frá liðið, síðan verkfallið var av, og nú virkið í Saltangará enn ikki er klárt at taka ímóti, verður meira til okkurt annað virki hjá felagnum.

Í Miðvági siga tey, at har hava tey fisk til fleiri dagar, og tí vænta tey ikki, at gólvini verða turr aftur, fyrr enn vikan er úti.

### Vesturtúgvan

Nú undirsjóvartunnilin er komin, er einki til hindurs fyri at koyra fiskin beinleiðis úr Eysturoynni og allan vegin vestur á bryggjuna í Miðvági.

Skip landa av og á beinleiðis til virkið, men tann stóri parturin av ráfiskinum kemur í bili, og soleiðis var tað eisini, áðrenn tunnilin læt upp.

Trolarin, Vesturtúgvan, landaði í Miðvági leygardagin. Teir høvdu 100.000 pund av upsa, 14.000 pund av toski og 4.000 pund av hýsu.



Listastevnan:

# Løna skaldargávum




*Listastevnan skipar fyri kapping í yrkingaskriving í ár, og komandi ár verður kappast um at skriva bestu skaldsøguna*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Í sambandi Listastevnuna í ár verður skipað fyri yrkingakapping, har tíggju yrkingar skulu veljast út. Samstundis verður sett hol á eina skaldsøgu kapping til Listastevnuna í 2004**

LISTASTEVNAN
*Heri á Rógvi*

Fyrst var tað ein stuttsøgukapping í 2001. Í sambandi við Listastevnuna 2002 varð skipað fyri kapping at finna besta handritið til ein útvarpsleik. Í ár verður aftur ein kapping á skránni á Listastevnuni, og hesaferð er tað so ein kapping um at skriva yrkingar. Somuleiðis er longu nú avgjørt, at í 2004 skal kappast um at skriva bestu skaldsøguna.

Sum heild verður nógv við bókmentir á skránni á Listastevnuni í ár, greiðir Oddvá Nattestad, samskipari fyri Listastevnuna, frá.

Fay Weldon leggur leiðina til Føroya á Listastevnu og onnur tiltøk verða eisini á skránni við tilknýti til bókmentaheimin.

### 10 tær bestu

Listastevnan 2003 verður hildin í døgunum 7. til 17. august.

Innan 1. mai skulu luttakandi yrkingar verða sendar Listastevnuni. Yrkingarnar skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður fyri at vera við, men hetta er so eisini einasta treytin. Onkrar treytir eru um, at tekstirnir skulu latast inn í tveimum útgávum, men hesar eru ikki stórvegis krevjandi.

Kappingin virkar á tann hátt, at tíggju tær bestu yrkingar verða valdar út millum tær innsendu. Hesar verða allar løntar við 5.000 kr.

Gjørt verður ikki upp, hvør verður nummar eitt, tvey osfr.

Umframt virðislønirnar verða hesar yrkingarnar eisini lisnar í Útvarpi Føroya, í táttinum Listastevnuyrkingin 2003 – ein yrking um dagin, meðan Listastevnan er.

Til at finna tíggju tær bestu hevur Listastevnan funnið eina dómsnevnd. Í dómsnevndini sita Høgni Djurhuus,tíðindamaður, Bergljót av Skarði, studentaskúlalærari, og Kim Simonsen, bókmentafrøðingur.

Yrkingarnar verða ikki givnar út av Listastevnuni, men tað stendur øðrum frítt at geva hesar út.

### 150.000

Longu nú er eisini avgjørt, at ein kapping verður fyriskipað til Listastevnuna 2004. Tað er heldur ikki so undarligt, at kappingin verður almannakunngjørd so langt frammanundan, tá kappingin snýr seg um at skriva bestu skaldsøguni.

Freistin at lata handrit inn er 1. mai 2004. Besta skaldsøgan fær 150.000 kr. í virðisløn. Eingin virðisløn er til nakra av hinum.

Dómsnevndin, mannað við Turið Kjølbro, ritstjóra, Bergi Hansen, Ph.D., og Katrini Næs, stundaskúlalærara, skal velja bestu skaldsøguna, men nevndin hevur eisini tilskilað sær rættin onga virðisløn at lata, um einki handrit livir upp til krøvini frá teimum.

Handritini skulu verða í minsta lagi 75 A-4 síður til støddar, tey skulu vera skrivað soleiðis, at frástøðan ímillum reglurnar er 1.5, og tey skulu latast Listastevnu Føroya í einari pappírsútgávu og einari teldutøkari útgávu.

Talan kann eins væl vera um eina ungdómsskaldsøgu ella skaldsøgu fyri børn sum nakað annað. Einasta treytin er síðutali.

Oddvá Nattestad sigur, at Listastevnan letur eina stóra virðisløn av teirra játtaðu pengum, men fer ikki at geva skaldsøguna út. Hinvegin hevur Listastevnan als einki ímóti, at onkur annar gevur vinnandi skaldsøguna ella aðrar í kappingini út.